

*Perur í tíggjunda tali á jolatrænum á Vaglinum í Havn, vórðu ehtta vikuskifti antin sløktar ella skrúvaðar úr*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Fult av fullum fólki

**Óvanliga nógv rok var í býnum í Havn um vikuskiftið**

VIKUSKIFTI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Gott veður og nógv jólaborðhald.

Tað kann hava verið orsøkin til, at fleiri fólk vóru so ólátað í býnum í Havn um vikuskiftið.

Sambært politinum vóru gøturnar bæði leygarnattina og sunnunáttina fullar av dýrandi fullum fólki.

Summi duttu av út og máttu vekjast ella eisini koyrast heim. Einir tveir gistu í geglinum.

Onnur vóru ill í sær, og fleiri ferðir vórðu boð eftir politinum, tí illstøða var millum fólk antin inni á vertshúsum ella úti á gøtuni. Tað eydnaðist í teimum førunum at sissa óðu fólkini aftur.

Frá fríggjadegnum og til í morgun ringdi alarmsentralurin 15 ferðir. Nakrar ferðir var tað sjúka, men fleiri ferðir var orsøkin, at fólk vóru dottin í fylsskapi.

Í sambandi við bardaga verður skuldseting reist í onkrum føri, men hetta málið fekst ikki meira at vita um í dag.

Við fylsskapi fylgir altíð herverk. Onkrir handilsrútar vórðu knústir, og bilar fingu snuddir.

Sum ikki eina ferð fekk jólatræið á Vaglinum toyggið.

# Steðga ikki fyri reyðum ljósi

**Um vikuskiftið fingu tríggir bilførarar klipp í koyrikortið, tínteir aktaða ikki ljósreguleringina antin á Brúnni við Streymin ella í Hósvík**

FERÐSLA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Brúgvin um Streymin verður umvæld, og í Hósvík arbeiðir Landsverk við at breiðka vegin.

Í báðum støðum eru ferðsluljós sett upp, tí bara ein vegbreyt er, og hetta er eisini gjørt fyri at tryggja menninar, sum gera vegarbeiðið.

Men langt frá allir bilførarar virða ferðsluljósini, og hetta vikuskifti fingu tríggir bilførarar klipp í koyrikorti fyri at koyra fram við reyðum ljósi.

Í onkrum føri hava arbeiðsmenn hjá Landsverki vrið noyddir at renna fyri lívinum fyri ikki at vera árendir av bilum, sum hava koyrt við nógvari ferð mitt gjøgnum vegarbeiði.



Almenn móttøka
VÆLKOMIN Á NÝGGJA APOTEKIÐ




Í sambandi við at Nýggja Apotekið letur upp fyri almenninginum, bjóða vit til móttøku:

TÝSDAGIN 15. DESEMBER KLOKKAN 16.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin at njóta okkara lekkru, nútímans umstøður, og vit bjóða sjálvandi gestum okkara okkurt søtt og gott til góman.

NÝGGJA APOTEKIÐ
ÁARVEGUR 4-10 / P.O.BOX 107 / FO-110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 31 32 33

SENDISTOVAN